

*Hesin roynir at skelka heimskipanina*



*Eitt neyðugt stig í menning av heiminum av at taka av landsbúnaðarstuðulin í USA og ES*



ugt eisini at verða sterkur heima. Sum vit síggja dømini viðvíkjandi støðuni millum Føroyar og Ísland og Peru og USA, so eru londini óttafull, tá latast skal upp. Og um eitt land sum Føroyar óttast eitt land sum Ísland, hvussu stórur er óttin so ikki aðrastaðir? Stríðið at lyfta Afrika, er júst at skapa javnbjóðis handilssambond og eini slíkari leið hava øll menningarlondini tørv á, men ein kann ivast í um fyrstaheimslondini veruliga ynskja at hesi londini gerast ov sterk, tí tað merkir eisini at tey kunnu fáa størri ávirkan. At tað hendir nakað á økinum, er avtalan USA júst hevur gjørt við 6 Miðamerikonskt lond, sum byrjar Cafta samstarvið.

## Einskiljing og altjóðargerð

Í okkara egna høpi, eru fleiri viðurskifti, sum fram verða tikin, og so er tað eisini tilvildin sum ger, at einskiljingarbylgjan rakar í fríhandilssáttmálan við Ísland. Einskiljingin merkir, at fyritøkur sum í dag eru almenn ogn, skulu á privatar hendur. Hetta merkir eisini at strategisk politisk ætlan við hesum ognum verður slept sum møguleiki. Sjálvandi kunnu almennu Føroyar seta nøkur krøv til keyparar, men hesi verða altíð veikari, enn tá ognin er á almennum hondum. Her kemur so óttin fyri íslendingum inn. Íslendskur kapitalur hevur longu sett seg á nógv í Føroyum, og fleiri óttast at hann verður dominerandi. Og er tað so ein trupulleiki? Tá tað almennu sleppur ognum, eigur tað at verða eitt feitt, um pengarnir er føroyskir ella ikki, sum keypa ognirna, tí tað sum um ræður er at talan er um privatar pengar og ognarrætt, og at ognirnar koma undir vanligar marknaðartreytir. Í mun til útlendskar og kanska serliga íslendskar íløgur, er vandin at einstøk fólk og feløg koma at sita á ov nógvum, og at møguligur vinningurin ikki kemur Føroyum til góða, soleiðis at eitt møguligt yvirskot ikki verður brúktur til íløgur í Føroyum. Men tað er helst ein náttúrlig avleiðing av alheimsgerð og spjaðing av váða. Í íslandi verður t.d. ávarað ímóti, at ognirnar eru á ov fáum hondum, soleiðis at rapar ein av stóru eigarunum, er vandi fyri at Ísland fer á heysin, og her mugu vit eisin meta um, um vit vilja hava henda váða í fyritøkur, vit einskilja.

## Politisk krøv

Tí liggur tað eisini á politisku skipanini ikki bert at hyggja at prísi, men eisini keyparanum, tá einskilt verður. Tað er umráðandi hjá okkum, at treytir verða settar við ognarrættin á t.d. telefonútboði og infrastrukturi, tí vit liggja ikki mitt á evropeiska meginlandinum, og feløg berjast ikki um at sleppa at útbyggja Føroyar. Føroyar eru so lítlar, at tað er skeivt og beinleiðis vandamikið uttan fyrilit at brúka ástøðir, gjørd til stórar marknaðir. Okkara støðd ger, at vit á fleiri økjum fara at hava antin alment ella privat monopol, og her skal politiska skipanin tryggja okkum soleiðis, at støðan ikki skaðar landið, tí eingin vissa er fyri at privat monopol er betri enn alment. Tað almenna situr í dag á ognum, sum tað helst ikki skal sita á. Hvar markið so gongur, er ilt at semjast um, tí politiskar hugsjónir siga ymiskt. Men tað má verða greitt, at eitt endamál er at skilja ímillum alment og privat, og síðan at eisini atlit verða tikin til føroysk áhugamál. T.d. at tryggja ferðasamband úteftir, at tryggja fjarskifti innanhýsis og úteftir. Hvar ein heldur hesar uppgávur liggja best, veldst nógv um politiskan lit, men vit mugu bert minnast til, at tað ber til við lógum og reglum og at seta krøv, og at einskiljing í sær sjálvum ikki er nakað garanti, men at skilagóð einskiljing kann skapa karmar um einar betri Føroyar á summum økjum, tí tað almenna er í dag partur av økjum, har tað ikki skal verða. Tó skulu it ikki gloyma, at Føroyar ikki eru eitt vanligt samfelag, tí vit eru sera lítil og liggja fjarskotið, tí er tað ikki vist at patentloysnir til størri lond júst er tað, sum skal til í Føroyum.





*Einskiljingar er stóra uppgávan, sum verður samskipa av Løgmanni og landsstýrismonnunum í fíggjarmálum og vinnumálum*

## Framburður krevur opinleika og ábyrgd

Altjóða handilssambond er ein fyritreyt fyri at verða við millum heimsins fremstu lond. Tí skal hetta økið raðfestast høgt í Føroyum. Altjóða handilssambond eru eisini eitt av høvuðsamboðunum til at betra um ójavnan í heiminum, og skal Føroyar verða við altjóða, skulu vit eisini spæla við her. M.a. er ein náttúrligur partur av menningarhjálp handilssáttmálar, sum framyvir kunnu geva menningarlondunum veruligan møguleika at menna seg og harvið verða amboðið ímóti hungursneyðum, esktremum fátækradømi og ójavna og eisini tálma misnøgdini, sum helst eigur sín part av stuðlinum sum altjóða yvirgangurin hevur í fleiri londum. Skulu vit føroyingar hava ein leiklut á altjóða pallinum, er tað eisini okkara ábyrgd at verða partur í hesum.



*Peruanski forsetin, Alejandro Toledi stríðist av øllum alvi fyri at fáa eina nøktandi fríhandilsavtalu við USA*